LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 20. apríl 2016
J.Nr.: LUM-32- 15/00033-8
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Frágreiðing

# frá

# eftirlitsvitjan í

# Reiðrinum (nú Mýrusóljan) í Runavík

# tann 18. mars 2015

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur .......... 3

2. Skipan av eftirlitsvitjanini .......... 4

3. Lýsing av Mýrusóljuni .......... 5

4. Samrøða við eindarleiðaran og starvslesandi .......... 5
   4.1. Skipan av umlættingini .......... 6
   4.2. Heilivágur og røkt .......... 6
   4.3. Menningarætlanir .......... 7
   4.4. Samskifti við børnini .......... 8
   4.5. Samstarv við foreldur .......... 8
   4.6. Samstarv við skúlan .......... 8
   4.7. Samstarv við fjølbrekatoymið Smæruna .......... 8
   4.8. Starvsfólk .......... 9
   4.9. Valdsnýtsla .......... 9
   4.10. Bíðilisti .......... 9
   4.11. Visitering .......... 9
   4.12. Upplýsing um tilboðið .......... 9
   4.13. Eftirlit .......... 11
   4.14. Brunaviðurskifti .......... 11

5. Rundtúrur í stovninum .......... 11

6. Samrøða við starvsfólk .......... 12

7. Endalig samrøða við eindarleiðaran og starvslesandi .......... 13

8. Samandráttur .......... 14

9. Tilmæli .......... 16

# 1. Inngangur

Tann 1. oktober 2014 varð heimildin hjá Løgtingsins umboðsmanni víðkað til eisini at fevna um eitt serligt eftirlit við privatum stovnum o.ø., sum hava til uppgávu at taka sær av børnum. Umboðsmaðurin skal m.a. hava eftirlit við, at Føroyar halda ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum (ST) um at tryggja rættindi hjá børnum og ungum.

Í hesum sambandi gjørdi umboðsmaðurin av at fara á eftirlitsvitjanir í stovnum fyri børn, sum hava menningartarn og/ella bera fjølbrek. Orsøkin til hetta var, at børnini á hesum stovnum teljast millum tey veikastu í samfelagnum og hava lítlan og ongan møguleika at siga frá sjálvi, um teirra rættindi ikki verða vird.

Umboðsmaðurin gjørdi í fyrsta umfari av at fara á eftirlitsvitjanir í Frítíðartilboðnum við Landavegin í Tórshavn og í fjølbrekatoyminum Smæruni í Tórshavn. Seinni gjørdi umboðsmaðurin av at víðka eftirlitsvitjanirnar til eisini at fevna um skúlan á Trøðni og umlættingarstovnarnar Eirargarður 16 A í Tórshavn og Reiðrið (nú Mýrusóljuna) í Runavík. Á henda hátt var gjørligt at fylgja fleiri av børnunum í fjølbrekatoyminum Smæruni gjøgnum allan gerandisdagin og harvið fáa eina heildarmynd av gerandisdegnum hjá teimum og síggja tey tilboð, sum vórðu bjóðað teimum. Eftirlitsvitjanin í Mýrusóljuni fevndi sostatt bara um tey børn við fjølbreki, sum dagliga vóru í fjølbrekatoyminum Smæruni og til umlætting í Mýrusóljuni í vikuskiftum.

Heimildirnar fyri slíkum eftirlitsvitjanum eru at finna í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, sum broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 20. desember 2013 (umboðsmanslógini), og eru soljóðandi:

> “...
>
> **§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
>
> ...
>
> **§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.
>
> **§ 6**.
>
> ...

*Stk. 7*. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

**§ 8**. Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

...

*3. stk*. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

...”

## 2. Skipan av eftirlitsvitjanini

Á eftirlitsvitjanini í Mýrusóljuni luttóku vegna Løgtingsins umboðsmann Sólja í Ólavsstovu, umboðsmaður, og Elinborg Apol, løgfrøðiligur fulltrúi.

Áðrenn eftirlitsvitjanina varð Almannaverkið kunnað um vitjanina og hevði í hesum sambandi latið umboðsmanninum neyðug skjøl og upplýsingar viðvíkjandi teimum børnum við fjølbreki, sum vóru til umlætting í Mýrusóljuni. Í tilfarinum um Mýrusóljuna sást, at arbeiðssetningurin hjá Mýrusóljuni er:

- At hava fyrilit til menningina, aldurin og tørvin hjá tí einstaka borgaranum.
- At tað er gott samband og tilknýti ímillum borgaran og starvsfólkið.
- At borgarin kennir seg sum ein týdningarmiklan part í einum sosialum felagsskapi.
- At menna samskifti og sjálvvirðið og at menna borgaran til sjálvhjálp.
- At borgarin er við til at taka avgerðir, og er við í dagliga arbeiðinum í stovninum.
- At veita tryggleika, umsorgan og nærveru.
- Gott samstarv við foreldur/avvarðandi.

Eftirlitsvitjanin vardi í 2½ tíma og byrjaði við einari samrøðu við eindarleiðaran í Mýrusóljuni, A, og starvslesandi B, sum var sjúkrarøktarfrøðingur og las til námsfrøðing.

Aftan á samrøðuna varð umboðsmaðurin víst runt í stovninum.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina var leiðslan í Mýrusóljuni kunnað um, at umboðsmaðurin eisini ynskti at tosa við tey starvsfólk í stovninum, sum vóru um børnini við fjølbreki, meðan tey vóru til umlætting har. Umboðsmaðurin hevði samrøðu við trý av starvsfólkunum.

Eftirlitsvitjanin endaði við eini samrøðu við eindarleiðaran, A, og starvslesandi, B.

Áðrenn eftirlitsfrágreiðingin hjá umboðsmanninum varð endaliga greidd úr hondum, varð hon send Almannamálaráðnum, Almannaverkinum og Mýrusóljuni til viðmerkingar. Ongar viðmerkingar vóru til frágreiðingina.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin millum annað tikið útgangsstøði í niðanfyrinevndu reglum:

Lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. mars 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 22. mai 2015.

Kunngerð nr. 6 frá 16. januar 1992 um ST-samtykt frá 20. november 1989 um rættindi barnsins – Barnarættindasáttmálin.

Sáttmáli sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

## 3. Lýsing av Mýrusóljuni

Mýrusóljan heldur til í einum nýggjum bygningi frá 2015, sum er bygdur til endamálið. Almannamálaráðið eigur bygningin. Umframt at veita samdøgursumlætting til børn, sum bera fjølbrek, er Mýrusóljan eisini eitt frítíðartilboð til børn við fjølbreki. Mýrusóljan er partur av trivnaðareind 2 í Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum.

Pláss er fyri tólv børnum. Børn undir skúlaaldur kunnu vera allan dagin í Mýrusóljuni. Børn í skúlaaldri eru í stovninum seinnapartar. Tá skúlin er stongdur vegna feriu, hava børnini møguleika at vera allan dagin í Mýrusóljuni. Tá eftirlitsvitjanin var, vóru níggju børn knýtt at dagtilboðnum í Mýrusóljuni. Eitt barn var undir skúlaaldur og var í stovninum allan dagin. Hini vóru øll eldri og nýttu stovnin antin sum frítíðartilboð aftan á skúlatíð ella sum virkistilboð, tí tey vóru liðug við 10. flokk.

## 4. Samrøða við eindarleiðaran og starvslesandi

Eftirlitsvitjanin byrjaði við einari samrøðu við eindarleiðaran, A, og starvslesandi, B.

Umboðsmaðurin greiddi frá, at hon m.a. fór at hyggja eftir hølunum, hvørji tilboð børnini høvdu í Mýrusóljuni, um lóggáva manglaði á økinum, um Barnarættindasáttmálin varð hildin o.s.fr. Eisini fór hon at spyrja um ymiskt, sum hon hevði lagt til merkis undir vitjanunum í hinum støðunum, har børnini vóru, og sum foreldur høvdu greitt henni frá. Umboðsmaðurin ynskti við vitjanini at vísa á møguligar manglar fyri at bøta um korini hjá børnum, sum bera fjølbrek. Í sambandi við eftirlitsvitjanina, høvdu starvsfólkini í Mýrusóljuni møguleika fyri at

gera vart við trupulleikar og skipanir, sum, eftir teirra tykki, ikki virkaðu, og á henda hátt fáa gjørt broytingar.

**4.1. Skipan av umlættingini**
Trý av teimum børnunum, sum gingu í fjølbrekatoyminum Smæruni, vóru til umlætting í Mýrusóljuni. Tað eina av børnunum skuldi tó byrja at fara til umlætting í Eirargarði í staðin stutt aftan á eftirlitsvitjanina. Tilboðið um umlætting fevndi um 10 vikuskifti um árið. Umlættingin varð skipað soleiðis, at fjórða hvønn mánað varð fyrispurningur sendur til foreldrini, hvørji vikuskifti tey ynsktu umlætting til børnini næstu fýra mánaðirnar. Síðani vórðu ynskini viðgjørd, soleiðis at ynskini hjá flest møguligum vórðu gingin á møti.

Umboðsmaðurin greiddi frá, at foreldur søgdu seg verða ótrygg við fjarleikan millum Mýrusóljuna og Landssjúkrahúsið, tí børnini knappliga kundu gerast ógvuliga sjúk og fáa brúk fyri bráðfeingis hjálp. Starvsfólkini høvdu ikki upplivað hetta sum nakran trupulleika. Víst var á, at sjúkrabilur hevði støð á Lambareiði, og at læknavakt var nærhendis at heita á.

**4.2. Heilivágur og røkt**
Starvsfólkini, sum vóru í føstum starvi í Mýrusóljuni, høvdu atgongd gjøgnum intranetið hjá Almannaverkinum til upplýsingar um mannagongdir í sambandi við handfaring av heilivági. Starvsfólkini, sum arbeiddu í vikuskiftunum, høvdu ikki hesa atgongd, og tí lógu eisini skriv um mannagongdirnar í eini mappu í stovninum.

Heilivágurin hjá børnunum, sum eftirlitsvitjanin fevndi um, var skamtaður heimanífrá í skamtanareskjur. Yvirlit fylgdi við heiliváginum, og starvsfólkini krossaðu av, tá heilivágur og maskur vórðu givnar. Upplýsingar um røkt av børnunum lógu í stovninum, og børnini høvdu ein plastikklumma við upplýsingum við sær, hvørja ferð tey komu til umlætting í Mýrusóljuni.

Heilivágurin var læstur inni í einum heilivágsskápi. Øll starvsfólkini í stovninum góvu heilivág. Tey vóru ikki komin út fyri, at skeivur heilivágur var givin. Umboðsmaðurin vísti á, at starvsfólkini eiga at verða kunnað um, hvat tey skulu gera, um so er, at tey geva heilivág skeivt, og at tey skuldu boða frá hesum.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um starvsfólkini í Mýrusóljuni høvdu fingið kunning um, hvussu tey skulu bera seg at, um tey góvu heilivág skeivt.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at skjølini, sum liggja á intranetinum, viðvíkjandi mannagongdum í mun til heilivág, eru tey somu, sum liggja í eini mappu í stovninum. Tí hava tímalønt og avloysarar atgongd til somu skjøl, sum tey føstu starvsfólkini, undir hesum mannagongd fyri, hvat skal gerast, um skeivur heilivágur verður givin. Síðani eftirlitsvitjanina vóru skjølini hongd upp í heilivágsrúminum, og øll

starvsfólkini, bæði avloysarar og føstu starvsfólkini, høvdu gjøgnumgingið skjøl og mannagongdir.

Um tað var neyðugt, gjørdu starvsfólkini eisini venjingar við børnunum, meðan tey vóru til umlætting í Mýrusóljuni. Okkurt av børnunum hevði útgerð til venjing við sær, tá tað kom til umlætting.

Okkurt av børnunum nýtti apnø-monitor, og starvsfólkini nýttu apnø-monitorin eftir eini vegleiðing, sum foreldur at barninum hevði gjørt. Umboðsmaðurin ynskti at vita, um starvsfólkini høvdu hugsað um, hvør hevði ábyrgdina, um okkurt skuldi gingið galið, og tað vísti seg, at vegleiðingin ikki var røtt. Hetta søgdu starvsfólkini seg ikki hava hugsað um. Umboðsmaðurin vísti á, at tað eiga at vera yrkisfólk, sum vegleiða um nýtsluna av einum slíkum tóli.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið greiða frá, hvussu Almannaverkið tryggjar sær, at vegleiðing til starvsfólk í nýtslu av apnø-monitorum og øðrum líknandi hjálpartólum verður givin av yrkisfólki.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at tað í framtíðini ikki er ætlanin, at starvsfólk skulu fáa upplæring í apnø-monitori ella líknandi hjálpartólum frá foreldrum, men at hendan upplæringin verður veitt frá Landssjúkrahúsinum.

Allir upplýsingar viðvíkjandi heilsustøðuni hjá børnunum, sum bera fjølbrek, komu frá foreldrunum. Starvsfólkini ynskti eisini at fáa heilsuupplýsingar um børnini frá heilsufakligum umhvørvi, sum t.d. sjúkrahúsunum, soleiðis at røktin kundi góðskutryggjast.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið greiða frá, um Almannaverkið hevði ætlanir um, at stovnar, sum eru um børn við fjølbreki, fáa upplýsingar um heilsustøðuna hjá børnunum, sum bera fjølbrek, frá heilsufakligum umhvørvi, soleiðis at røktin av hesum børnum verður góðskutryggjað.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið ikki kann áleggja heilsuverkinum at geva Almannaverkinum upplýsingar um heilsustøðuna hjá børnum við fjølbreki. Hetta krevur samtykki frá foreldrunum. Eitt ávíst samskifti er við heilsuverkið um, at tey fáa til vega hetta samtykki. Arbeiðið er enn ikki komið á mál, men ynskiligt hevði verið, at upplýsingarnir komu frá heilsuverkinum.

**4.3. Menningarætlanir**

Menningarætlanir vóru fyri dagligu brúkararnar av stovninum, men ongar menningarætlanir vóru fyri børnini, sum eftirlitsvitjanin fevndi um, tí tey vóru til umlætting í Mýrusóljuni í frítíðini, og tá var meiningin, at tey skuldu hugna sær, taka sær av løttum og hava tað stuttligt.

Virksemið í vikuskiftunum fevndi um svimjing, at ganga túr, fara til framsýningar, at bowla, spæla kort, fara á kafévitjan o.s.fr.

**4.4. Samskifti við børnini**

Stovnurin nýtti samskiftisskipanina “Boardmaker” til at samskifta við børnini. Ætlanin var at taka í nýtslu ein skipan við samskifti gjøgnum teldlar. Starvsfólkini høvdu verið á skeiði í hesi skipan í 3 dagar, og teldlar vóru á veg.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015 bað umboðsmaðurin Almannaverkið greiða frá, um skipanin við samskifti gjøgnum teldlar var sett í verk. Umboðsmaðurin bað eisini Almannaverkið greiða frá, hvørjar ætlanir Almannaverkið hevði, um, at starvsfólkini í Mýrusóljuni, sum vóru um børnini við fjølbreki, fingu skeið í samskiftisháttinum teknmáli/tekn til talu, soleiðis at tey betur vórðu før fyri at samskifta við børnini.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at onkur misskiljing var íkomin viðvíkjandi tí, at Mýrusóljan ætlaði at nýta eina skipan við teldlum til samskifti. Upplýst varð, at einki av børnunum samskifti við tekn til talu. Børnini høvdu sera ymiskan tørv, og tí bar ikki til at standardisera samskiftisháttin til at nýta ein ávísan leist. Flestu børnini høvdu tó teldlar við heimanífrá. Av tí at børnini høvdu sera ymiskan tørv, nýtti Mýrusóljan ymiskar alternativar samskiftishættir í tøttum samstarvi við IKT á Sernám og í samstarvi við foreldur. Sernám veitti ráðgeving og vegleiðing í mun til samskifti hjá børnunum. Øll starvsfólkini høvdu fingið skeið í nýggjastu samskiftishættunum við teldlum.

**4.5. Samstarv við foreldur**

Byrjanarfundur varð hildin við foreldrini, tá børnini byrjaðu í umlætting í Mýrusóljuni, men regluligir foreldrafundir vórðu ikki hildnir, tí børnini vóru bara til umlætting í Mýrusóljuni 10 vikuskifti um árið. Mýrusóljan sendi foreldrunum teldupost áðrenn eitt umlættingarvikuskifti, og børnini fingu bræv við sær heim aftan á eitt umlættingarvikuskifti. Um nakað serligt var at tosa um, varð hetta avgreitt gjøgnum telefon, og foreldrini plagdu eisini at ringja til Mýrusóljuna, meðan børnini vóru til umlætting, fyri at hoyra, hvussu tað gekk.

**4.6. Samstarv við skúlan**

Mýrusóljan hevði einki samskifti við skúlarnar hjá børnunum, sum eftirlitsvitjanin snúði seg um.

**4.7. Samstarv við fjølbrekatoymið Smæruna**

Starvsfólk í fjølbrekatoyminum Smæruni í Tórshavn koyrdi børnini til Runavíkar til umlætting í Mýrusóljuna. Hetta mettu starvsfólkini í Mýrusóljuni vera ein fyrimunur, tí á henda hátt kundu starvsfólkini í fjølbrekatoyminum Smæruni boða teimum frá, um nakað serligt var at taka hædd fyri viðvíkjandi onkrum av børnunum.

**4.8. Starvsfólk**
33 starvsfólk vóru knýtt at Mýrusóljuni. 14 av starvsfólkunum vóru í føstum starvi, meðan restin vóru tímalønt. Millum starvsfólkini vóru bæði námsfrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar og heilsuhjálparar. Stovnurin hevði torført við at fáa námsfrøðingar, tí eingin søkti, tá námsfrøðilig størv vórðu lýst leys.

Talið av starvsfólki, sum vóru knýtt at umlættingini til børnini, var tengt at tørvinum, alt eftir hvørji børn vóru til umlætting tey ymisku vikuskiftini. Tað eina av børnunum, sum eftirlitsvitjanin fevndi um, hevði náttarvakt við sær til umlætting í Mýrusóljuni.

Starvsfólkini í Mýrusóljuni fingu sálarfrøðiliga hjálp frá sálarfrøðingi hjá Almannaverkinum, tá tørvur var á tí. Mýrusóljan nýtti annan sálarfrøðing til leiðsluna enn til starvsfólkini.

**4.9. Valdsnýtsla**
Vegleiðingar um mannagongdir í sambandi við valdsnýtslu lógu á intranetinum hjá Almannaverkinum, og øll føst starvsfólk høvdu atgongd til intranetið. Tey sum arbeiddu í vikuskiftunum, høvdu ikki atgongd til intranetið, og tí lógu vegleiðingarnar um mannagongdirnar eisini í eini mappu í stovninum. Ongar klagur ella fráboðanir um valdsnýtslu vóru viðvíkjandi teimum børnunum, sum eftirlitsvitjanin fevndi um.

**4.10. Bíðilisti**
Onki barn var á bíðilista til pláss í Mýrusóljuni.

**4.11. Visitering**
Almannaverkið tók sær av sjálvari upptøkuni til umlættingarpláss í Mýrusóljuni.

**4.12. Upplýsing um tilboðið**
Mýrusóljan hevði ikki faldarar, sum upplýstu um, hvørji tilboð Mýrusóljan hevði. Avvarðandi at børnum við fjølbreki fingu at vita um tilboðini gjøgnum Almannaverkið. Víst varð á, at foreldur at børnum við fjølbreki mangla ráðgeving um, hvat børn við fjølbreki og avvarðandi teirra hava rætt til, og hvørjir møguleikar eru, og at slík ráðgeving átti at verið givin longu á føðideildini, tá barnið varð føtt. Tað var, sum um eingin samlaði træðrirnir og samskipaði, har markamót vóru.

Upplýst varð, at foreldur at nýføddum barni, sum ber fjølbrek, fáa bjóðað heilsufrøðingar, læknakanningar og ein opnan innleggingarseðil. Víst varð á, at tað at fáa eitt barn, sum ber fjølbrek, elvir til sálarliga kreppu hjá foreldrunum. Foreldur at børnum, sum bera fjølbrek, áttu tí at fingið bjóðað sálarliga hjálp beinanvegin, brekið var ávíst, og so leingi tað var neyðugt. Tá børn við fjølbreki byrjaðu í stovninum, vóru tey umleið 4 ára gomul, og tá kundu nógvir sálarligir trupulleikar longu hava bygt seg upp hjá foreldrunum.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, hvørjar ætlanir Almannaverkið hevði um at samskipa tænasturnar til børn, sum bera fjølbrek, og avvarðandi teirra, har markamót eru, og hvussu Almannaverkið vissar sær, at allar familjur við børnum, sum bera fjølbrek, eru vitandi um hesar tænastur og harvið hava møguleika at vera við í skipanini.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at øll børn, ið bera brek ella hava likamliga ella sálarliga sjúku og fáa tænastur frá Almannaverkinum, undir hesum Mýrusóljuni, hava ein sosialráðgeva á deildini Børn og ung. Sosialráðgevin viðger umsóknir um endurgjald fyri meirútreiðslur og mista inntøku vegna tað at uppihalda einum barni, ið ber brek, heima, umframt umsóknir um stuðul frá Trivnaðardeplinum. Harumframt veitir sosialráðgevin ráðgeving og vegleiðing til hesar familjur um møguleikar fyri stuðli frá Almannaverkinum og øðrum myndugleikum. Familja og sosialráðgevi samskifta eftir tørvi, og er tað vanliga minst ein fundur við familjuna um árið. Almannaverkið fær javnan kunning frá Landssjúkrahúsinum og frá Ráðgevingini fyri føroyingar uttanlands, tá ið eitt barn við fjølbreki er føtt. Almannaverkið setur seg í samband við familjuna og kunnar um møguleikar fyri at søkja um stuðul v.m. Almannaverkið er av tí fatan, at hetta samstarv er væl skipað.

Almannaverkið upplýsti víðari, at Almannaverkið er partur av "Tí góðu tilgongdini", ið er ein avtala millum Almannamálaráðið, Mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Kommunufelagið og Autismufelagið. Leikluturin hjá Almannaverkinum er, vegna Almannamálaráðið, at vera samskipari hjá hesum familjum og at veita autismuráðgeving. Børn, ið bera fjølbrek, eru ikki fevnd av "Tí góðu tilgongdini". Skipanin við "Tí góðu tilgongdini" verður eftirmett í næstum og møguliga víðkað til at fevna um fleiri málbólkar. Almannaverkið bíðar eftir, at Almannamálaráðið og hinir myndugleikarnir eftirmeta skipanina.

*Eisini bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði ætlanir um at bjóða foreldrum at børnum, ið bera fjølbrek, sálarliga hjálp, beinanvegin brekið er ávíst og síðani eftir tørvi.*

Almannaverkið kunnaði umboðsmannin um, at kommunulæknar kunnu ávísa avvarðandi til fólk, sum eru rakt av álvarsligari avlemjandi sjúku, til sálarfrøðiliga viðgerð. Hetta upplýsa sosialráðgevarnir hjá Børn og ung á Almannaverkinum foreldrum at børnum, ið bera fjølbrek. Heilsutrygd rindar tá 40% av kostnaðinum, og foreldrini kunnu søkja um stuðul til egingjaldið eftir forsorgarlógini. Heimildin at bjóða foreldrum at børnum við fjølbreki sálarliga hjálp, beinanvegin brekið er ávíst, liggur sostatt hjá kommunulækna eftir avtalu við Heilsutrygd. Um foreldrini eftirfylgjandi hava tørv á sálarligari hjálp, tekur kommunulæknin støðu til, um tey eru fevnd av avtaluni við Heilsutrygd. Almannaverkið kunnar foreldrini um møguleikan at venda sær til Gigni, ið skipar fyri foreldrabólkum, heimavitjan v.m. til foreldur, sum hava børn við serligum avbjóðingum t.d. likamligum og sálarligum breki.

### 4.13. Eftirlit

Bæði námsfrøðiligt eftirlit og heilsufakligt eftirlit skuldu eftir ætlan verða stutt eftir eftirlitsvitjanina hjá umboðsmanninum. Stovnurin hevur seinni upplýst, at námsfrøðiligt eftirlit var í Mýrusóljuni í mai 2015, men at heilsufakligt eftirlit ongantíð hevur verið í Mýrusóljuni.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015 bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, hvørjar ætlanir Almannaverkið hevði um, at Mýrusóljan fekk heilsufakligt eftirlit.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at heilsufakligt eftirlit var umbiðið og avtalað, men av einhvørjari orsøk møtti eftirlitið ikki. Almannaverkið fór at venda sær til Landslæknan um at fáa heilsufakligt eftirlit í Mýrusóljuni.

### 4.14. Brunaviðurskifti

Stovnurin var heilt nýggjur. Eitt brandskáp manglaði, og eitt vindeyga manglaði at verða skift, fyri at brunamyndugleikarnir kundu góðkenna bygningin. Stovnurin hevði sent fyrispurning til Landsverk um góðkenningarskriv frá brunamyndugleikum. Ongin rýmingarætlan var gjørd fyri bygningin.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um viðurskiftini viðvíkjandi brunatryggleikanum í Mýrusóljuni nú vóru fingin í rættlag, og um bygningurin var góðkendur av brunamyndugleikunum.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at síðani eftirlitsvitjanina var brandskáp sett upp, vindeygað var skift og bygningurin var brunagóðkendur.

*Umboðsmaðurin bað eisini Almannaverkið um at greiða frá, hvørjar ætlanir Almannaverkið hevði um, at rýmingarætlan varð gjørd fyri bygningin, har Mýrusóljan heldur til, og at starvsfólkini vórðu vegleidd í rýmingarætlanini.*

Almannaverkið kunnaði umboðsmannin um, at Mýrusóljan hevði verið í samband við sløkkiliðsleiðaran í Runavík um at fáa brandskeið og at skipa rýmingarætlan. Rýmingarætlanin skuldi gerast í samstarvi við sløkkiliðið. Arbeiðið var byrjað, men var ikki liðugt enn.

## 5. Rundtúrur í stovninum

Bygningurin var í tveimum hæddum við trappum og lyftu millum hæddirnar. Høvuðsinngongdin var beinleiðis inn frá túninum. Bygningurin var tiltalandi, ljósur og rúmligur. Mýrusóljan hevði ein buss, sum varð brúktur til longri túrar.

Børnini, sum eftirlitsvitjanin snúði seg um, vóru til umlætting á eini deild fyri seg. Vanliga vóru fýra til fimm børn til umlætting í senn. Tey høvdu egin kømur við seingjum, sum vóru lagaðar til tey. Tvey og tvey kømur høvdu eitt stórt og vælútgjørt baðirúm saman, sum lá millum kømrini. Uppihaldsrúmið á deildini var stórt og ljóst við køki og útgongd út á eina stóra træterrassu við útsýni út á fjørðin.

## 6. Samrøða við starvsfólk

Í samrøðuni við starvsfólkini luttóku D, námsfrøðingur, E, heilsuhjálpari, og F, hjálparfólk.

Starvsfólkini í Mýrusóljuni høvdu so at siga onga sjúkrafráveru, bara tað vanligu sjúkrafráveruna, sum tá beinkrím o.tíl. gekk. Starvsfólkini trivust væl og vóru ikki strongd sum so. Tó var strongdin jøvn í sambandi við arbeiðið við børnunum við fjølbreki, tí starvsfólkini vóru bangin fyri, at børnini fóru millum hendurnar á teimum, tí tey vóru so veik. Víst var á, at arbeiðið var tungt bæði kroppsligt og sálarligt, og at tað tí var avmarkað, hvussu leingi fólk toldu hetta arbeiði.

Umlættingin av børnunum var skipað í fýra bólkar við fýra børnum í hvørjum, og fýra starvsfólk vóru knýtt at bólkunum. Ætlanin var at broyta hetta, soleiðis at meiri dynamikkur kom í. Stovnurin hevur seinni upplýst, at upp til 8 børn hava verið til umlætting í senn, men at stovnurin roynir ikki at hava meira enn 7 børn í umlætting í senn, soleiðis at eitt kamar altíð er tøkt, um onkur skuldi fingið bráðfeingis tørv á umlætting.

Fyrstuhjálparskeið vórðu hildin javnan, og starvsfólkini hildu tað verða tryggjandi at hava sjúkrarøktarfrøðingar og heilsuhjálparar í starvsfólkahópinum. Tey kundu tó hugsað sær, at fleiri námsfrøðingar arbeiddu í Mýrusóljuni.

Tað er ikki lætt hjá foreldrum at børnum, sum bera fjølbrek, at fáa umlætting aðrastaðni, sum t.d. hjá familju, tí hesi hava ikki neyðugar umstøður og hjálpiamboð heima. Tí áttu foreldrini at fingið tilboð um fleiri umlættingarvikuskifti, jú eldri børnini blivu, tí foreldrini høvdu ivaleyst tørv á meiri umlætting, jú størri og tyngri børnini blivu.

Sum heild var samstarvið gott við foreldrini at teimum børnum, sum vóru í stovninum, og starvsfólkini løgdu dent á at ráðføra seg við foreldrini.

Bæði børn við fjølbreki og foreldur teirra kunnu vera illa fyri sálarliga. Børnini kunnu t.d. eisini hava eina depressión umframt at bera fjølbrek, soleiðis at tey t.d. gerast ill, mótfallin, óglað og áhugaleys. Starvsfólkini vistu ikki, hvussu tey kunnu hjálpa í slíkari støðu, tí børn, ið bera fjølbrek, fáa ikki orðað seg munnliga.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um børn, sum bera fjølbrek, fáa tilboð um sálarfrøðiliga hjálp, tá mett verður, at tørvur er á tí.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at kommunulæknar kunnu ávísa fólk rakt av álvarsligari avlemjandi sjúku til sálarfrøðiliga viðgerð, og at hetta eisini er galdandi fyri børn. Sosialráðgevarnir hjá Børn og ung á Almannaverkinum upplýsa foreldrum at børnum við fjølbreki um hetta, um tað er viðkomandi fyri støðuna hjá familjuni. Heilsutrygd rindar tá 40% av kostnaðinum, og foreldrini kunnu søkja um stuðul til egingjaldið eftir forsorgarlógini.

Víst varð á, at børn, sum bera fjølbrek, mangla tilboð um bústovn, tá tey verða 18 ár.

*Við skrivi, dagfest 22. oktober 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði nakra ætlan um at geva øllum børnum við fjølbreki tilboð um bústovn, tá tey verða 18 ár.*

Við skrivi, dagfest 17. november 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið hevur sum er ov fáar bústaðir at vísa á. Børn við fjølbreki, sum søkja um bústað, verða sett á bíðilistan, til bústaður kann veitast.

**7. Endalig samrøða við eindarleiðaran og starvslesandi**

Eftirlitsvitjanin endaði við eini samrøðu við A, eindarleiðara, og B, starvslesandi. Umboðsmaðurin vísti á, at karmurin um stovnin er framúr góður við nýggja bygninginum, og at starvsfólkini høvdu sagt seg vera nøgd við umstøðurnar, og at Mýrusóljan var eitt gott arbeiðspláss. Umboðsmaðurin greiddi síðani frá, hvørjar trupulleikar hon ætlaði at taka upp í sambandi við eftirlitsvitjanina í Mýrusóljuni:

- Foreldur at børnum, sum bera fjølbrek, eiga at fáa upplýst, beinanvegin brekið er ávíst, hvørji rættindi og møguleikar tey hava og at fáa eitt heildartilboð.

- Í sambandi við nýtslu av apparatum, sum t.d. apnø-monitorum, eiga stovnar at tryggja sær, at nýtsluvegleiðing til starvsfólkini verður givin av yrkisfólki.

**8. Samandráttur**

Tann 18. mars 2015 var Løgtingsins umboðsmaður á eftirlitsvitjan í Reiðrinum (nú Mýrusóljan) í Runavík. Mýrusóljan er m.a. karmur um umlætting fyri børn og ung, sum bera fjølbrek. Mýrusóljan er partur av trivnaðareind 2 í Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum. Eftirlitsvitjanin snúði seg um umstøðurnar hjá teimum børnum við fjølbreki, sum dagliga vóru knýtt at fjølbrekatoyminum Smæruni í Tórshavn, og sum vóru til umlætting í Mýrusóljuni. Á eftirlitsvitjanini luttóku umboðsmaðurin og eitt starvsfólk hjá umboðsmanninum.

Samanumtikið er umboðsmaðurin væl nøgd við eftirlitsvitjanina. Tað var hugaligt at vitja ein nýggjan stovn, sum var bygdur til endamálið. Samskiftið við Almannaverkið hevur verið gott, og Almannaverkið hevur víst vilja at loysa teir trupulleikar, sum umboðsmaðurin vísti á.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina ynskti umboðsmaðurin at vita, um starvsfólkini vóru kunnaði um, hvussu tey skulu bera seg at, um tey góvu heilivág skeivt. Almannaverkið upplýsti, at síðani eftirlitsvitjanina var kunnleikin vorðin betur. Skjøl, sum lýstu mannagongdirnar, vóru hongd upp í heilivágsrúminum, og øll starvsfólkini høvdu gjøgnumgingið mannagongdirnar.

Starvsfólkini fylgdu eini nýtsluvegleiðing til apnø-monitor, sum var gjørd av foreldrum. Umboðsmaðurin spurdi, hvussu tryggjast kann, at slík vegleiðing bara verður givin av yrkisfólki. Almannaverkið upplýsti, at í framtíðini er ætlanin, at slík vegleiðing verður veitt frá Landssjúkrahúsinum.

Upplýsingar um heilsustøðurnar hjá børnunum komu frá foreldrunum. Umboðsmaðurin spurdi, um ætlanin er, at hesar upplýsingarnar í staðin koma frá heilsufakligum umhvørvi, soleiðis at røktin av børnunum verður góðskutryggjað. Almannaverkið boðaði frá, at hetta krevur samtykki frá foreldrunum, og at eitt ávíst samskifti var við heilsuverkið um hetta, men at arbeiðið enn ikki var komið á mál.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, um starvsfólkini, sum vóru um børnini við fjølbreki, fóru at fáa skeið í teknmáli/tekn til talu. Almannaverkið kunnaði um, at einki av børnunum samskifti við tekn til talu. Børnini høvdu sera ymiskan tørv, og tí bar ikki til at standardisera samskiftisháttin til at nýta ein ávísan leist. Nýttu samskiftishættirnir vóru í samstarvi við IKT á Sernám og foreldur.

Víst varð á, at Mýrusóljan manglaði faldarar um tilboðini í Mýrusóljuni, og at foreldur at børnum við fjølbreki eiga at fáa samskipaða ráðgeving um rættindi og møguleikar hjá barninum og familjuni frá føðing av. Umboðsmaðurin spurdi, hvørjar ætlanir eru um at samskipa tænastur til børn við fjølbreki og avvarðandi teirra, har markamót eru. Almannaverkið kunnaði um, at øll børn, ið bera brek, hava ein sosialráðgeva, sum veitir ráðgeving, vegleiðir og viðger umsóknir. Almannaverkið fær javnan kunning frá Landssjúkrahúsinum og frá Ráðgevingini fyri

føroyingar uttanlands, tá ið eitt barn við fjølbreki er føtt. Almannaverkið setur seg í samband við familjuna og kunnar um møguleikar fyri at søkja um stuðul v.m. Almannaverkið er av tí fatan, at hetta samstarv er væl skipað. Almannaverkið umhugsar, at børn við fjølbreki eisini skulu gerast partur av skipanini við "Tí góðu tilgongdini".

Umboðsmaðurin ynskti at vita, um ætlanir eru um at bjóða foreldrum at børnum við fjølbreki sálarliga hjálp, beinanvegin brekið var ávíst og síðani eftir tørvi. Almannaverkið upplýsti, at henda heimild liggur hjá kommunulæknunum, og at sosialráðgevarnir upplýsa foreldrum um hetta.

Heilsufakligt eftirlit hevði ongantíð verið í Mýrusóljuni. Almannaverkið fór at venda sær til Landslæknan um at fáa heilsufakligt eftirlit í Mýrusóljuna.

Bygningurin var ikki góðkendur av brunamyndugleikunum, tí eitt brandskáp manglaði, og eitt vindeyga manglaði at verða skift. Síðani eftirlitsvitjanina er brandskáp sett upp, vindeygað er skift og bygningurin er brunagóðkendur.

Umboðsmaðurin spurdi eftir eini rýmingarætlan fyri bygningin. Almannaverkið upplýsti, at rýmingarætlanin verður gjørd í samstarvi við sløkkiliðið í Runavík. Arbeiðið er byrjað, men er ikki liðugt enn.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, um børn við fjølbreki fáa tilboð um sálarfrøðiliga hjálp, tá mett verður, at tørvur er á tí. Almannaverkið kunnaði um, at kommunulæknarnir kunnu ávísa børnunum til sálarfrøðiliga viðgerð, og at sosialráðgevarnir upplýsa foreldrum um hetta, um tað er viðkomandi fyri støðuna hjá familjuni.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, um ætlanir eru um at geva øllum børnum við fjølbreki tilboð um bústovn, tá tey verða 18 ár. Almannaverkið kunnaði um, at børn við fjølbreki, sum søkja um bústað, verða sett á bíðilista, men at ov fáir bústaðir eru at vísa á.

**9. Tilmæli**

Umboðsmaðurin mælir til, at strembað verður eftir at fáa samtykki frá foreldrunum, fyri at fáa heilsuupplýsingar um børnini við fjølbreki frá heilsufakligum umhvørvi við tí fyri eyga at góðskutryggja røktina av børnunum.

Umboðsmaðurin mælir til, at rýmingarætlanin fyri Mýrusóljuna verður gjørd liðug skjótast gjørligt, soleiðis at starvsfólkini kunnu fáa kunning um hana.

Umboðsmaðurin mælir til, at tilboðið um umlætting fyri børn við fjølbreki verður víðkað, jú størri og tyngri børnini verða.

Umboðsmaðurin mælir Almannaverkinum til, at avvarðandi at børnum við fjølbreki fáa betri skrivliga kunning um, hvørji rættindi børn við fjølbreki og familjur teirra hava, hvørji krøv kunnu setast til t.d. umlættingarstovnar, og hvørji tilboð teir einstøku stovnarnir hava til børn, sum bera fjølbrek.

Umboðsmaðurin mælir til, at skipað samskifti verður millum umlættingardeildina í Mýrusóljuni, fjølbrekatoymið Smæruna og Skúlan á Trøðni, soleiðis at samstarvað verður um m.a. stimbran av børnunum, og soleiðis at tryggjað verður, at samskiftishættirnir eru teir somu í bæði frítíðartilboði, skúla, umlættingarstovnum og heima.

Aftan á at hava verið á eftirlitsvitjan í umlættingarstovnunum Mýrusóljuni í Runavík, Eirargarði 16 A í Tórshavn, fjølbrekatoyminum Smæruni og Skúlanum á Trøðni mælir umboðsmaðurin til, at ein heildarætlan verður gjørd fyri hesi børn, sum eru so heilsuliga veik, soleiðis at sleppast kann undan, at tey verða flutt ov nógv runt. Ein slík loysn ber møguliga við sær, at lærarin kemur á staðið, har børnini eru, fyri at undirvísa.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður